

# Klaksvíkar

**Tá sagt verður, at skipini eru seld fyri "restskuld", ljóðar hetta ikki serliga sannførandi**

**Fakta**
Polarhav og Stjørnan
Smíðistaður: Akranes, Ísland
Ár: 2004
Longd: 37 metrar
Breidd: 8,50 metrar
BT: 425
Maskina: Mitsubishi, 6s, 4t
Maskinorka: 662 kW/900 HK
Ferð: 10 sjómíl

# Stjól í Rúsuni

Ein tilkomin maður, sum var í Rúsuni fríggjadagin, varð meldaður av starvsfólkunum, tí hann gekk fram við kassanum uttan at gjalda fyri eina hálva fløsku, sum starvsfólkini vistu, at hann hevði tikið úr handlinum og hevði uppi á sær.

Í Rúsuni afturhildu tey mannin, til løgreglan kom á staðið.

Vakthavandi sigur, at maðurin hevði tikið við sær eina hálva fløsku av brennivíni, sum hann ikki ætlaði sær at gjalda fyri.

- Vit staðfestu, at tað var rætt, sum starvsfólkini søgdu, og maðurin varð ákærdur og fekk bót á staðnum, sum tað verður rópt.

Vakthavandi sigur, at ein slík bót avhongur av, um viðkomandi hevur stolið áður, og hvussu stórur stuldurin er.

- Vanligt hevði verið at givið eina ávaring í fyrsta umfari, men í hesum førinum var hetta ein gamal kenningur, sum tey í Rúsuni høvdu eyguni eftir - og soleiðis avdúkaðu fyrri stuldur, tá viðkomandi bara gekk fram við kassanum uttan at gjalda, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

Vakthavandi sigur, at tað meiri enn so kemur fyri, at tey verða boðsend, tí handilsfólk meta, at stuldur er framdur.

- Men hetta er ikki spesielt í Rúsuni, verður lagt aftrat.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Myndin er tikin í Norðurlandahúsinum, tá Tavan í Leirvík varð kosin at vera Ársins Virki*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

# Osmund tekur seg úr Tavuni

**SØLA Tá Norðoya Íløgufelag hevur keypt ísfiskatrolararnar, Polarhav og Stjørnuna og 25% av Tavuni í Leirvík, er parturin í Tavuni tann, sum Osmund Justinussen og aðrir áttu. – Hetta hendi ógvuliga knappliga, sigur stjórin, Jóan Magnus Rasmussen**

Vilmund Jacobsen

Tá gulllaksavirkið Sp/f Tavan í Leirvík varð kosið á vera Ársins Virki á vinnudegnum seinasta, tóku stjórin, Jóan Magnus Rasmussen og Osmund Justinussen, sum er í nevndini í felagnum, móti heiðrinum.

Nú tað í vikuskiftinum frættist, at Norðoya Íløgufelag hevur keypt ísfiskatrolararnar, Polarhav og Stjørnuna og 25% av Tavuni í Leirvík, er tað parturin hjá Osmundi og øðrum, sum er seldur.

## Kom knappliga

Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni, sigur við Sosialin í morgun, at sølan av skipum og virki er hend knappliga.

– Jú, hetta er hent rættiliga knappliga, men vit vóna, at alt verður, sum tað var. Vit hava skilt, at Polarhav og Stjørnan framvegis fara at fiska gulllaks í vertíðini, og vit vóna eisini, at áhugamálini hjá teimum, sum nú koma at taka partin hjá Osmundi og øðrum, hava somu áhugamál við virkseminum, sum vit hava havt.

Jóan Magnus Rasmussen sigur seg ikki vera órógvaðan av broyttu eigaraviðurskiftunum, men viðgongur, at tingini eru hend knappliga.

## Góð útlit

Stjórin veit annars at siga, at útlitini fyri árið í ár eru hampiliga góð.

Sp/f Tavan hevði sín higartil besta ár í fjør, tá avlopið var umleið 10 miljónir krónur.

– Vit ætla okkum í gongd aftur við gulllaksavirkseminum, tá vertíðin byrjar aftur. Hetta verður væntandi, tá vit koma út í apríl.

Í vetrarhálvuni virkar Tavan upsa, men í ár hava nøkur av upsaskipunum ligið, tá tey fóru av knóranum, og haraftra hevur fiskiflotin verið raktur av verkbanni.

– Vit plaga at arbeiða eini 2000 tons av upsa um árið, og hugsandi er, at nøgdin verður nakað minni í ár. Tó hava vit hava nógv at gera á virkinum seinastu 14 dagarnar, sigur Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni í Leirvík.

*vilmund@sosialurin.fo*

